# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Vøggustovan á Konmansmýru 25 ár



1. mars 2008 fylti Vøggustovan á Konmansmýru 25 ár. Vøggustovan er partur av stovninum á Konmansmýru, men byrjaði sum "Vøggustovan við Strond" 18. okt í 1965. Tað var Nancy Björklund, sum saman við Birthe Toftagarð í januar 1965 fóru undir at leggja ætlanir um at stovna eina vøggustovu í Havn.

Longu níggju mánaðir seinni byrjaði virksemið í "Vøggustovuni við Strond" við Nancy, Birthe og trimum ungum gentum í starvi. Á vøggustovuni vóru tá 22 børn.

Í 1972 flutti vøggustovan niðan á Lützenstrøð og húsaðist har, til Vøggustovan á Konmansmýru lat upp 1. mars 1983.

Longu tá Nancy byrjaði vøggustovuvirksemið, varð hon varug við trupulleikan hjá foreldrunum at fáa børnini ansað, tá tey fyltu 3 ár og tí vóru ætlanir um eisini at stovna ein barnagarð. Søkt varð um at fáa lendi til ein størri stovn, og stovnurin á Konmansmýru varð bygdur.

Barnagarðurin á Konmansmýru byrjaði sítt virksemi 1. juni í 1983 og 8 børn úr vøggustovuni byrjaðu í barnagarði 1. juli hetta árið.

Starvsfólkini á stovninum hava verið trúgv. Miðal starvsaldurin hjá starvsfólkunum í vøggustovuni er umleið 16 ár, og tá skal havast í huga at onkur "bert" hevur arbeitt í nøkur fá ár.

Nógv er broytt gjøgnum árini og starvsfólkini hava als ikki staðið í stað. Tey eru virkisfús og vit hava stóra gleði av teirri hollu vitan og royndum, ið er á staðnum.

Tá hugt verður í "svørtubók" síggja vit at 867 børn hava verið innskrivað í Vøggustovuna frá byrjanini í 1965. Fleiri "børn" hava verið og eru enn foreldur á stovninum, og tað hevur verið stuttligt at kunna fylgja okkara "børnum" gjøgnum lívið.

Vøggustovan hátíðarheldur føðingardagin við at hava prinsessu- og prinsaverkætlan alla vikuna frá 3. mars til 7. mars. Fríggjadagin 7 mars er opið hús frá kl. 15 til 18 og hóvi verður tá at síggja úrslitið av arbeiðinum í vikuni. Tað hevði glett okkum um nógv fyrrverandi og núverandi børn, foreldur, starvsfólk og onnur áhugað komu á gátt.

Vit starvsfólk takka Nancy fyri tað áræði, hon vísti fyri so nógvum árum síðani og vilja við hesum eisini nýta høvið at ynskja henni tillukku við degnum. Vónandi síggjast vit fríggjadagin.

Heilsan

**Vøggustovan á Konmansmýru**

## Dagurin

6. mars. Gotfred. Óvist er, hvønn sipað verður til. Summir halda ein kardinal í Róm, deyður umleið ár 1100, aðrir ein biskup í Amiens, deyður í 1115. Týskt navn settsaman av orðunum Guð og friður.

## Páskastevna í Eysturoynni

**Á páskum skipa brøðrasamkomurnar í Eysturoy fyri samfelagsstevnu. Hesaferð eru møtini í Siloa í Fuglafirði og í ítróttarhøllini á Kambsdali**

Brøðrasamkomurnar í Eysturoynni skipa á hvørjum ári fyri samfelagsstevnu á páskum – annaðhvørt ár í Fuglafirði/Kambsdali og annaðhvørt ár í Runavík.

Hesaferð eru møtini í Siloa í Fuglafirði og í ítróttarhøllini á Kambsdali, og tað eru samkomurnar í Hebron í Leirvík, Filadelfia í Gøtu og Siloa í Fuglafirði, sum skipa fyri. Byrjað verður í Siloa skírisdag kl. 18 við uppbyggingarmøti, og hildið verður fram langafríggjadag kl. 18 við uppbyggingarmøti, og kl. 21 verður ungdómsmøti.

Páskaaftan verður so farið út í ítróttarhøllina á Kambsdali, har ein evangelisk sangløta verður kl. 19. Her verður serligur dentur lagdur á sang, og evangeliskur boðskapur verður borin fram. Fleiri bólkar og einstaklingar fara at syngja, m.o. Vitin, Siloakórið, Kristina Bærendsen og Durita Mohr Jacobsen. Kl. 21 verður so hildið fram við ungdómsmøti.

Páskadag verður møti við breyðbróting í ítróttarhøllini kl. 11, og samstundis verður skipað fyri sunnudagsskúla



í auluni á studentaskúlanum. Kl. 16 verður familjumøti. Eftir tað møtið verður náttúrði til øll, og hildið verður so fram við evangeliskum møti kl 18. Hesin dagurin endar eisini við einum ungdómsmøti, sum byrjar kl. 21.

Annan páskadag endar stevnan við evangeliskum møti í ítróttarhøllini, og tað byrjar kl. 17.

Lýst verður nærri í bløðunum seinni, men fyrireikararnir siga, at evnið á ungdómsmøtunum verður: "Hví er Bíblian framvegis viðkomandi á okkara døgum?"

---

### Tøkk

*Hjartaliga takka vit tykkum øllum, sum gjørdu Diamantbrúdleypsdagin 14. februar 2008 ógloymandi. Takk fyri brøv, fjarrit, uppringingar, blómur, gávur, sangir og talir. Ein serlig tøkk til Hornorkestrið og sangkórið í Betesda, og tykkum mongu sum komu og heilsaðu uppá okkum. Tit gjørdu okkum so glað og takksom.*

– Mathilda og Fríðrik



*Tíðin rennur sum streymur í á fram í Harrans navni! Lítlum báti eri eg á, himnastrond fyri stavni.*

---

### Tøkk

Hjartaliga takka vit tykkum øllum sum á ymiskan hátt sýndu samkenslu og hjálptu til, tá ið okkara elskaða mamma, vermamma, omma og langomma

**Elsa Maria Hvidbro**
vanliga nevn Mia
Klaksvík

andaðist og varð jarðað.
Stóra tøkk til talara fyri góð og troystarrík orð.
Tøkk til berarar og sangarar.
Tøkk fyri blómur og kransar.
Tøkk til tykkum øll, ið fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað

*Familjunnar vegna*
**Jóhanna, Dorius, Súsanna og Ólavur**

---

### Tøkk

Hjartaliga tøkk fyri sýnda samkenslu, tá góða mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Myrthly Lervig**

andaðist og varð jarðað.
Tøkk fyri blómur, kransar og gávur til Heimið á Mýrunum.
Eina tøkk til starvsfólkini á Mýrunum fyri góða røkt.
Tøkk til tykkum øll, ið fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Asta, Fía, Árni og Emmy**